# Mjørki og sól um vikuskiftið

- Hann verður eystan í ættini um vikuskiftið, og tí verður onkustaðni mjørki og onkustaðni sól, sigur veðurmaðurin Petur Skeel Jacobsen. Hóast hann er lækkaður niður í eystan, verður framvegis gott veður teir komandi dagarnar. Eysturættin ger tað so, at mjørki og kanska sirm kann verða á teimum støðunum, ið venda ímóti ættini. Hinvegin eru góðir møguleikar fyri sólargeislum á teimum støðunum ið venda vestureftir. - Hitin fer at liggja millum 11 og 15 stig. Har mjørki er, kann hitin koma niður í 10 stig, sigur Petur. Vindurin verður lítil og tað sama er galdandi fyri avfallið. Tó kann roknast við regni sunnukvøldið og mánamorgunin.

**sb.**



*- Framvegis turrveður, sigur Petur Skeel*

# Raðfest Sandoyartunnilin

**Sjálvandi skal Sandoyartunnilin koma. Men hannn eigur at raðfestast í einari langtíðar íløguætlan, og hann skal fíggjast um íløgukarmin hjá løgtinginum, ikki um raksturin, sigur Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum**

SANDOYARTUNNIL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Partafelagsformurin hevur virkað væl og eftir ætlan í sambandi við byggingina av bæði Vágatunlinum og Norðoyatunlinum. Men hetta eru bæði verkætlanir, har partafeløgini hava møguleika at forrenta eitt lán, tí inntøkurnar í sambandi við ferðsluna gjøgnum báðar tunlarnar er somikið stór, at hetta letur seg gera. Støðan við einum Sandoyartunli er ein heilt onnur.

Tað vísir Poul Michelsen á í sambandi við nógvu umrøðuna, sum ætlaði tunnilin undir Skopunarfirði hevur fingið seinastu dagarnar.

Sama ætlan var frammi fyri tveimum árum síðani, tá tosið um Hovstunnilin tók seg upp. Eisini tá var Poul Michelsen frammi og ávaraði ímóti hesum forminum av fígging av einum almennum arbeiði. Og ta ferðina varð lurtað eftir kritikkinum.

- Lat meg strika undir, at eg als ikki eri ímóti, at ein tunnil verður gjørdur út í Sandoynna. Ein slíkur tunnil er skilagóð íløga, men tað má ikki koma upp á tal at lata eitt partafelag, sum landið fíggjar um raksturin, gera tunnilin. Tí tað er 80-ára hugsan við lít, sigur Poul Michelsen.



*Poul Michelsen, tinglimur fólkafloksins. Hann sigur ja til Sandoyartunnilin, men nei til at fíggja hann um raksturin hjá landskassanum*

Eins og løgtingsmaður Fólkafloksins førdi fram fyri tveimum árum síðani, sigur hann tað vera ógvuliga ivasamt, um tað yvirhøvur ber til at fíggja eina slíka íløgu umvegis eitt partafelag.

- Tað vildi verið undarligt, um eg stovnaði eitt partafelag við tí fyri eyga, at tað skuldi hava eitt undirskot. Partafeløg eru jú ein formur fyri rakstrarfeløgum, har endamálið er at vinna pening, og at luska íløgur landskassans inn í eitt partafelag fyri á tann hátt at sleppa uttan um íløgukarmin, ber stutt sagt ikki til, sigur Poul Michelsen.

## Erligar íløgur

Tá Smyril fyri nøkrum árum síðani varð bygdur, var hetta gjørt eftir einari verklagslóg, og hetta kravdi so, at skipið varð fíggjað um íløgukarmin á fíggjarlógini yvir eini trý ár. Og soleiðis skulu íløgur á einari verklagslóg fíggjast.

- Sjálvandi var hetta tungt, tí henda einsamalla íløgan fór við tveimum triðingum av íløgukarminum. Tað førdi so sjálvandi við sær, at annað mátti skúgvast til viks ella útsetast. Men úrslitið var ein ógvuliga sterkur búskapur, tí her fór alt fram í besta gjøgnumskygni, sigur Poul Michelsen.

Sama var galdandi fyri bæði Vágatunnilin og Norðoyatunnilin. Har vórðu íløgurnar gjørdar innanfyri íløgukarmin og meðan arbeiðini fóru fram. Og tað eru erligar íløgur.

Ætlanin við Sandoyartunlinum er hinvegin, at íløgurnar skulu gerast um raksturin, og tá verða tær kamufleraðar. Og tá tær ikki síggjast sum íløgur á fíggjarlógini, verða tær ikki roknaðar sum soleiðis, men bókaðar sum rakstur, metir Poul Michelsen.

- Og hetta er 80-ini umaftur, tá mann nýtti í mongum førum fiktivar grunnar at fíggja ymisk arbeiði við, og eingin visti rættiliga, hvat mann brúkti pengar til og hvat tað kostaði, fyrr enn rokningin kom, sigur Poul Michelsen.

## Raðfesting

Hann vil tí síggja eina samlaða ætlan fyri íløgurnar komandi árini, áðrenn hann tekur støðu til nakað sum helst í hesum sambandi. Tí ikki fyrr enn allar komandi verkætlanir fyriliggja, ber til at gera eina raðfesting av hesum.

- Sandoyartunnilin má koma, ikki bara fyri farleiðina til Sandoyar, men so sanniliga eisini við einari Suðuroyarfarleið í huganum. Tað fer frameftir at hava sera stóran týdning, at eisini henda farleið verður skipað við føstum sambandi, vísir fólkaflokstinglimurin á.

Men áðrenn samlaða íløguætlanin fyriliggur, ber honum ikki til at meta um, hvussu Sandoyartunnilin skal raðfestast.

Poul Michelsen sigur, at tað hevði verið skeivt á allar mátar at fíggja tunnilin soleiðis, sum uppskot er um, nevniliga við 60 milliónum um árið heilt fram til 2021. Hetta hevði verið at bundið komandi fýra løgting, og tað hevði verið moralskt skeivt.

Hinvegin sigur løgtingsmaðurin, at hjá 1200 fólkum at forrenta 700 milliónir er ógjørligt, og tí má tunnilin fíggjast av landinum. Men altso ikki um raksturin.

- Hettta ber als ikki til. Skal Sandoyartunnilin fremjast, so skal íløgan inn undir íløgukarmin á fíggjarlógini, sigur Poul Michelsen, tinglimur fólkafloksins.

# Sosialurin tríggjar mió. kr. í avlopi

**Raksturin hjá landsins størstu avís gongur væl. Í fjør var avlopið metstórt hjá Sosialinum**

ÁRSROKNSKAPUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Sp/f Sosialurin og Sp/f Húsið, sum eru feløgini aftan fyri virksemið hjá Sosialinum, høvdu aðalfund í gjár. Úrslitið hjá feløgunum var upp á tilsamans 2.950.296 krónur eftir skatt, sum var góðar 460.000 krónur.

Sp/f Sosialurin er rakstrarfelagið hjá Sosialinum, meðan Sp/f Húsið er felagið, sum eigur rakstrargøgnini í fyritøkuni. Fyrst og fremst part í P/f Prentmiðstøðini, ið Sosialurin eigur saman við Dimmalætting.

Tað var í fjør vár, at Føroya Javnaðarflokkur seldi Sosialin til Sp/f Miðlafelagið, sum keypti 66 prosent og Føroya Tele, ið keypti 34 prosent.

Á aðalfundinum varð nevndin afturvald. Í henni sita: Eyðfinnur Jacobsen, formaður, Eirikur Lindenskov, Jonhard Hammer, Johanna Vang, Tróndur Djurhuus og Richard Mortensen

Nevndin fegnast um úrslitið, sum er munandi betur, enn í fjør, tá ársúrslitið var upp á tilsamans 1.172.000 krónur eftir skatt.

Fyri ábyrdarblaðstjóran, Jan Müller, er ársrokniskapurin góður lesnaður.

Hetta vísir bara, at tað var rætt at broyta ognarviðurskiftini og loysa okkum frá fyrrverandi eigaranum, sum var ein politiskur flokkur, sigur Jan Müller.

Hann vísir á, at høvuðsorsøkin til góða úrslitið er tann ótroyttiligi innsatsturin hvønn einasta dag, sum øll starvsfólkini eiga sín lut í.

Somuleiðis hevur Miðlahúsið verið ein týðandi partur í menningini av allari fyritøkuni.